# burturav





Jóhan Petur á Stongum

## Hetta er nakað so stórt

Vit fingu orðið á Jóhan Petur á Stongum og Karina Mikkelsen úr SÍ, og Helen á Lakjuni úr ÍF, og spurdu tey um hvat tey hildu um dystin, og hvussu tey upplivdu hann, umframt ymiskt leyst var uppi og vendi.

**Hvussu ber tað til at tit eru so røsk til flogbólt í Sørvági?**
- Vit hava havt eitt rimmar ungdómsarbeiði, tey seinastu árini, og hetta sæst aftur í dag, sigur Jóhan Petur, ið vísur á at miðalaldurin er bert á leið 19 ár, har tann elsta er 23 ár. Hjá monnunum er Jón Nielsen 27 ár, og so er langt niður til tann næsta, so framtíðin sær bjørt út hjá báðum liðum, sigur hann endaliga.

**Var tað tann rætti vinnarin, ið vann FM?**
- Ja eg haldi heilt víst, at SÍ er tann rætti vinnarin. Vit kiksaðu totalt í steypafinaluni, og við dirvi og áræði kempaðu vit okkum til sigurs í dag. Vit vístu at vit eru besta flogbóltslið í landinum, sigur Jóhan Petur á Stongum, venjari hjá SÍ-kvinnunum og leikari á mansliðnum hjá SÍ, ið vann greipuna í ár.

Helen á Lakjuni

## Ikki nóg uppsettar

- Vit vóru virkuliga uppsettar undan steypafinaluni, og tá spældu vit skilagott og væl. Tá kiksaði totalt hjá SÍ, og vit vistu at tær ikki fóru at geva okkum ein so lættan dyst hesaferð, sigur Helen á Lakjuni, álitið á ÍF liðnum.

**Hvat kiksaði hjá tykkum?**
- Vit gjørdu alt ov nógvar býttar feilir, og tá sjálvt tað mest grundleggjandi gongur galið, tá gerst trupult at vinna eina flogbóltsdyst. Umframt feilirnar, haldi eg ikki at vit vóru nóg uppsettar til dystin, sum eitt lið.

**Var tað tann rætti vinnarin?**
- Eg ynski SÍ tillukku við sigrinum, men eg haldi enn at vit eru besta kvinnuliga flogbóltsliðið í landinum. Um allar halda áfram at spæla, so skulu vit nokk síggja, hvat sterkasta liðið í landinum verður í næstakappingarári. Hon sigur, at hon vónar at aldursforkvinnan á liðnum, Katrin Olsen fer at halda áfram at spæla, hóast hon hevur luftað tankum um at skerja tíðina, ið nýtt verður til flogbólt, eitt sindur.

Karin Mikkelsen

## Settu alt uppá pláss

- Vit fingu lagt nervarnar í »spannina«. Vit hava undan seinasta dystinum tosað aftur og fram um hvat tað er, ið ger, at tað gongur galið í okkara dystum, og so høvdu vit samráðst um at hava eina spann við, har vit samlaðu allar negativar tankar og hugsanir og blakaðu teir í eina spann. Hetta psykologiska meistaraverkið virkaði til fulnar, tí nervar vóru í øllum førum ikki tað, ið forðaðu teimum í nøkrum.

**Fingu tit eina uppreisn?**
- Ja, steypafinalan var ein sonn marra, og vit vóru ræðuliga uppsettar til at gera tað gott aftur. Vit skildaðu okkum sjálvum, fjepparum okkara og felagnum, at gera tað betur enn vit gjørdu í steypafinaluni.

**Er tað tann rætti vinnarin, sum í dag vann FM?**
- Avgjørt rætta liðið vann FM. Vit hava bert tap tein dyst í ár, sæð burtur frá steypaósigrinum, og tá var tað við minsta muni yvirhøvur (3-2).











